## Fyrilestur um íløgumentan

Hava útbúgving og kyn ávirkan á fíggjarligu íløgur okkara? Hvør dugir betur at spara upp til pensjón – menn ella kvinnur? Hvørjar útbúgvingar eru ein góð íløga? Og hvussu ávirkar útbúgvingin okkara fíggjarligu íløgur? Mikukvøldið klokkan 19 verður almennur fyrilestur í Miðlahúsinum. Juanna Schrøter Joensen, Ph.D. í búskaparfrøði, fer í almennum fyrilestri at greiða frá um íløgumentan. Fyrilesturin hevur heitið »Íløgumenten – velja búskaparfrøðingar og konufólk øðrvísi?« Tað er Virðisbrævamarknaður Føroya, VMF, ið skipar fyri tiltakinum. Fyrilesturin er ætlaður øllum áhugaðum. Evnini fevna víða, og tað ber til hjá øllum at fylgja við, og høvi verður eisini at seta spurningar. Evnini, ið verða umrødd, verða dúgliga viðgjørd í miðlum í londunum kring okkum, og økti áhugin fyri partabrøvum í Føroyum hevur eisini elvt til nógv kjak um hesi evni.




# Løgmaður ikki liðugur at kanna Jacob Vestergaard

**Í sambandi við málið um at seta skiparar á Smyrli, hevur Jacob Vestergaard verið bæði sakligur og ósakligur**

Løgmaður er nú í ferð við at kanna leiklutin hjá Jacob Vestergaard í sambandi við málið um at seta nýggjar skiparar á Smyrli.

Løgmaður greiddi løgtinginum frá í áðni, at hann er ikki liðugur enn.

Í løgtinginum í dag hevur Tórbjørn Jacobsen spurt løgmann um málið. Løgmaður hevur svarað aftur, at ein landsstýrismaður hevur heimild at geva einum stovnsleiðara tænastuboð.

Men tænastuboðini skulu altíð vera saklig, legði hann



*Løgmaður situr í løtuni og hugsar um støðuna og um, hvat hann skal gera við Jacob Vestergaard, landsstýrismann í kjalarvørrinum á spurninginum um skiparanar á Smyrli*

dent á.

Í hesum sambandi helt løgmaður avgjørt, at tað vóru eini saklig tænastuboð at biðja stjóran á Strandferðsluni bíða við at seta nýggjan skipara til Smyril til kæran frá gomlu skiparunum varð liðugt viðgjørd.

Kortini var ein skipari settur í starv hósdagin.

Hinvegin helt løgmaður avgjørt ikki, at tað var sakligt at geva stjóranum á Strandferðsluni tænastuboð um at annulera starvssetanina aftur.

Hann segði, at ein starvssetan kann ongantíð annulerast. Er eitt starv sett, kann talan bara vera um uppsøgn eftir heilt føstum mannagongdum við hoyringsskrivi, sakligum grundgevingum o.s.fr.

Ein av tinglimunum í samgonguni, sum helt, at talan var um eitt álvarsmál, var Andreas Petersen úr Javnaðarflokkinum.

Eitt endamál við stýrisskipanarlógini og lógini um ábyrgd landsstýrismanna var, at skera út í papp, hvørjar ábyrgdir, ein landsstýrismaður hevði. Eitt annað endamál var atr seta skott ímillum politiska valdið og fyrisitingina.

- Landsstýrismaðurin skuldi hava politisku ábyrgdina og stjórar skuldi hava ábyrgdina av stovnunum.

Andreas Petersen segði, at hendir tað, at landsstýrismaðurin kavar niður um stjóran og blanda seg í fyrisitingina, hava vit ein trupulleika og so fer álitið á fyrisitingina at rilla

Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins, vardi sín egna landsstýrismann helt, at hetta snýr seg ikki um setanarpolitikk, men um seniorpolitikk.

- Í hesum førum eru tveir skiparar sagdir upp av eini einasti grund og tað er, at teir fylla 67. Sjálvir hava teir hug at halda fram og sjálvandi skal landsstýrismaðurin syrgja fyri, at nýggj størv ikki vera sett fyrrenn kæran frá gomlu skiparunum er viðgjørd.

Jørgen Niclasen helt, at vit hava brúk fyri øllum í samfelagnum. Landið hungrar eftir arbeiðsmegi og tí er tað burturvið at senda fólk til hús, bara tí tey fylla 67 ár, segði Løgmaður.

## Siglingarávaring á Suðuroyarbanka avlýst

**Fiskiskip hava fingið áheitan um ikki at trola á einum øki á Suðuroyarbanka sum er á støðd við eini triðing av øllum Føroyum, men tað skuldi ikki vera galdandi í allar ævir**

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fiskiskip hava nú fingið áheitan um at fiska á einum øki á Suðuroyarbankanum. Orsøkin er, at nýggjur samskiftiskaðal er lagdur eftir botninum á bankanum og hann er so viðbrekin, at skip hava forboð fyri at fiska nærri enn hálvanannan fjórðing frá kaðalinum fyri ikki at oyðileggja hann.

Í løgtinginum í gjár vildi Hava Hergeir Nielsen av vita, hví kaðalin var lagdur ígjøgnum bankan og ikki eftir eini leið, sum ikki varð fiskileið.

Hann skilti boðini sum eini forboð og hann vísti á, at í boðunum til skipini var onki sagt um, at forboðið var tíðaravmarkað og skiparar harmaðust um hetta, tí talan var um eina sera góða fiskileið.

Bjørn Kalsø legði dent á, at talan var um eina siglingarávaring, sum ikki var galdandi í alla framtíð, men tað var galdandi í eitt styttri tíðarskeið, tí kaðalin skuldi tyrvast.

Tá ið kaðalin er tyrvdur, verður álagt skipum at vera 150 metrar frá kaðalinum.

Hann legði afturat, at tey høvdu hugsað um fiskiskapin og høvdu tískil lagt kaðalin eftir eini leið, sum skuldi erva fiskiskapin sum minst.

Annars vísti Landsstýrismaðurin á, at siglingarávaringin var avlýst aftur 4. november, men hann vísti ikki um tað var komið nóg væl fram.

**-áki-**

## Suðuroyingar noyðast framvegis til Havnar

**Sjúklingar í Suðuroy, sum hava brúk fyri serligari dialýsu í sambandi við nýrasjúku, sleppa ikki undan at ferðast til Suðuroyar**

Teir suðuroyingar, sum hava brúk fyri regluliga dialýsuviðgerð, verða framvegis noyddir at fara á Landssjúkrahúsið.

Tað svaraði Hans Pauli Strøm í løgtinginum í gjár.

Jenis av Rana spurdi landsstýrismannin um tað er rætt, at sjúklingur úr Suðuroy, ið kundu fáa viðgerð á Suðuroyar Sjúkrahúsi, noyðast regluliga til Havnar á Landssjúkrahúsið av fíggjarligum ávum, hósat ein eykajáttan til Suðuroyar sjúkrahús hevði gjørt tað møguligt at viðgerðin kundi verið veitt har.

Hans Pauli Strøm staðfestir, at av læknafakligum orsøkum verður mælt til, at øll viðgerðin verður savnað á einum stað, tí talan er um sera tøkniliga viðgerð, sum eisini krevur væl skikkað starvsfólk fyri at tryggjað dygdina í viðgerðini. Talan er sostatt ikki um at flyta sjúklingar til Havnar av fíggjarligum ávum.

Jenis av Rana helt ikki, at hetta var av læknafrøðiligum ávum men at tað var talan um at læknar á Landssjúkrahúsinum ikki vildi missa viðgerðina. Og hann helt, at tað kundi verið, at aðrir læknar høvdu eina øðrvísi meting av hesum.

Hinvegin ætlaði Hans Pauli Strøm at spyrja íslendingar um, hví teir hava savnað alla dialýsuviðgerð á einum og sama stað, hóast teir høvdu nógv sjúkrahús.

Annars upplýsti Hans Pauli Strøm, at Suðuroyar Sjúkrahús hevur fingið játtan til ein yvirlækna afturat.,

**-áki-**

## Føroya kendasta rundkoyring verður nú gjørd

**Nú verður loksins farið undir arbeiðið at gera rundkoyringina í Gøtudali**

Nú verður tað fyrsta dagin, at farið verður undir arbeiðið at gera rundkoyringina í Gøtudali.

Tað upplýsti Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum í løgtinginum í gjár.

Hetta er Føroya mest umrødda rundkoyring og hon hevur verið til umrøðu á tí høga tingi fleiri ferðir.

Og í gjár var tað so Tórbjørn Jacobsen, sum vildi hava at vita, hvussu gongur við ætlanini.

Bjarni Djurholm upplýsti, at ætlanin hevði leingi verið at fara undir rundkoyringina, men so vildi Gøtu Kommuna knýta nýggja ídnaðarøkið upp í rundkoyringina.

Tað ger, at rundkoyringin mátti flytast og gerast størri og tí varð hon eisini dýrari.

Samráðingar hava verið um, hvør skuldi rinda meirkostnaðin, men Bjarni Djurholm sigur, at nú er avgjørt, at landið skal betala meirkostnaðin, tí tað er í samsvari við trygdarátøk á vegum yvirhøvur. Sostatt verður farið undir rundkoyringina fyrsta dagin.

Og Bjarni Djurholm staðfesti, at allur peningurin verður játtaður í einum og tað merkir so eisini ,at øll rundkoyringin verður gjørd í einum, ístðain fyri at játtanin verður þetta sundur yvir fleiri ár, sum onkur eisini fryktaði fyri.

**-áki-**